

www.oljan.fo

**Jan Müller** 02 - 01 - 2013

# Stór orkustevna í Havn

Orkustevna verður í Høllini á Hálsi í Tórshavn 1. og 2. februar. Endamálið við Orkustevnuni er at kunna um orkumál. Orkustevnan savnar stovnar og fyritøkur á einum stað, har upplýst verður um møguleikarnar innan orkuloysnir. Málið er, at endabrúkarin verður kunnaður um viðkomandi viðurskifti innan orku og fær greiðu á kunning og vørum á marknaðinum. Tískil bjóðar Orkustevnan besta og største vitanar- og framsýningardepil innan orkumál stendur í skrivi frá fyriskiparanum. Orkupolitikur er javnan á dagsskrá í almenna rúminum. Metingar vísa ein stóran vøkstur av eltørvinum í Føroyum. Hetta sæst aftur í húsahaldinum, sum við tíðini verður meira og meira elektrifiserað. Samstundis økist tilvitanin um optimering av orkusparing á sera nógvum økjum. Hesi viðurskifti seta tískil størri krøv til effektivisering av stýringum og tólum umframt nýtslu og keyp av orkusparandi vørum og tænastum. Orkustevnan er tí eitt avbera gott og viðkomandi høvi hjá veitarum og stovnum at luttaka og vísa fram sína serfrøði og vørur. Á framsýningarøkinum vísa føroyskar fyritøkur og stovnar fram sína serfrøði av vørum og tænastum, sum hesi veita til marknaðin. Samstundis verður skipað fyri ráðstevnu á Orkustevnuni. Her verða viðkomandi evni viðgjørd frá serfrøðingum á økinum. Orkustevnan verður í Høllini á Hálsi í Tórshavn 1. og 2. februar 2013, og tað er LeGutt Events Management, sum fyriskipar Orkustevnuna. Ókeypis atgongd er fyri almenninginum.